Jacob Vestergaard, landsstýrismaður:

# - Kunnu ikki halda fram á sama hátt

**Nýggi landsstýrismaðurin í innlendismálum, Jacob Vestergaard, sigur seg ikki kunnu góðtaka, at tað skal taka yvir eitt ár at fáa viðgjørt eina umsókn um longt uppihalds- og arbeiðsloyvi. Jacob Vestergaard sigur, at tað er neyðugt at fáa eina varandi loysn á útlendingaøkinum.**

ÚTLENDINGAMÁL
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað hevur verið nógv fundarvirksemi í Tinganesi í morgun, og í Innlendismálaráðnum hevur verið fundast um málið um serbisku Sladiana Petrovic, sum mánakvøldið fekk at vita, at hon ikki sleppur at verða verandi í landinum.

**Útlendingarnir fáa vegleiðing**

Jacob Vestergaard hevur í sínum yrki sum løgreglumaður havt nokk so fitt við útlendingamál at gera, og tí hevur hann rættuliga gott innlit í slík mál.

- Eg veit eisini so mikið, at útlendingar, sum koma hagar og søkja um arbeiðs- og uppihaldsloyvi, fáa vegleiðing frá løgregluni um, hvussu tey skulu fyrihalda seg, tá ið tað kemur til at longja hesi loyvi. Tí hava tey eisini fingið at vita, at tað ikki ber til at skifta arbeiðspláss, fyrr enn nýtt arbeiðsloyvi er givið, greiðir Jacob Vestergaard frá.

Landsstýrismaðurin leggur afturat, at ein arbeiðsgevari, ið setur ein útlending í starv, eisini eigur at tryggja sær, at viðkomandi hevur arbeiðsloyvi. Hetta kann gerast við at hyggja í passi hjá viðkomandi, har arbeiðsloyvið er stemplað í. Av tí at nýtt arbeiðsloyvi skal gevast í sambandi við skifti av arbeiðsgevara, átti Fiskavirking í Miðvági eisini at hava tryggjað sær, at hesi viðurskifti vóru í lagi, tá ið Sladiana Petrovic varð sett í starv, sigur Jacob Vestergaard.

Landsstýrismaðurin dylur tó ikki fyri, at tað er als ikki nøktandi, at ein slík umsókn skal liggja til viðgerðar í meira enn eitt ár, tí tað er alt ov long tíð hjá fólki at bíða eftir einum svari.

**Ógvuliga harmiligt**

Persóniga heldur Jacob Vestergaard tað verða sera harmiligt, at slík ítróttarfólk, sum eru integreraði í samfelagið, verða send av landinum, men hann fær sum so ikki gjørt nakað við tað, tí talan er um eina donsku lóggávu, ið innlendismálaráðið noyðist at halda seg til.

- Sjálvsagt er tað ógvuliga óheppið, at hesi fólk koma í klemmu í skipanini, men vit fáa ikki gjørt so nógv. Hetta eru kensluborin mál, og tað ber ikki til, at tað verður sovorðið rok í sambandi við hvørt einstakt mál. Tí er tað neyðugt, at vit fáa gjørt eina varandi loysn á utlendingaøkinum, tí tað ber ikki til at halda fram á sama hátt, sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í innlendismálum, sum sigur seg vóna, at politiska skipanin ger okkurt við málið sum skjótast.



*Landsstýrismaðurin í innlendismálum, Jacob Vestergaard, sigur seg ikki kunnu góðtaka, at tað gongur meira enn eitt ár, áðrenn umsøkjari fær svar upp á eina umsókn um longjan av uppihalds- og arbeiðsloyvi.*

*Mynd: Terji Nielsen*

## Hava útsett fráferðina

**Eftir at tíðindini um útvísingina av Sladiana Petrovic bórust í Degi og Viku í gjárkvøldið, savnaðust nógvir sørvingar heima hjá serbisku hjúnunum. Stuðulin, ið tey hava fingið frá bygdafólkinum í Sørvági, hevur havt við sær, at tey bæði nú hava útsett fráferðina úr Føroyum nakrar dagar.**

ÚTLENDINGAMÁL
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað fór sum eldur gjøgnum alla Sørvágs bygd í gjárkvøldið, tá ið tað frættist, at dámligu serbisku hjúnini, Sladiana og Rajko Petrovic, eftir ætlan skuldu fara av landinum í dag heim aftur til Serbia, tí at Sladiana bleiv víst av landinum. Sørvingar í hópatali vendu sær til hjúnini og royndu at fáa tey at útseta fráferðina.

Dyggi stuðulin, ið Sladiana og Rajko hava fingið frá sørvingum, hevur eisini gjørt mun, tí tey bæði hava gjørt av at útseta fráferðina í nakrar dagar. Í Sørvági vóna fólk, at okkurt nýtt skal henda í málinum, soleiðis at tey bæði kunnu verða verandi. Enn er ikki greitt, nær tey bæði fara av landinum.

Heðin Mortensen, ÍSF-forseti:

# - Okkurt er spinnandi galið

**ÍSF-forsetin, Heðin Mortensen, sigur, at tað ikki kemur óvart á hann, at enn ein gøla um útlendsk ítróttarfólk í Føroyum er komin undan kavi. Hann heldur, at okkurt er spinnandi galið við føroysku skipanini, og at útlendingarnir ikki virðiliga viðferð av myndugleikunum.**

ÚTLENDINGAMÁL
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Hóast flestu føroyingar gjørdust skelkaðir av tíðindunum í Degi og Viku í gjár um serbisku hjúnini í Sørvági, sum nú noyðast av landinum, er ÍSF-forsetin, Heðin Mortensen, ikki kløkkur.

- Tað undrar meg als ikki. Vit í ÍSF hava í langa tíð gjørt vart við trupulleikan á økinum og havt nógv fundarvirksemi um hetta, men tað hevur ikki eydnast okkum at fáa eitt samstarv við løgtingi um trupulleikan, hóast óteljandi royndir, sigur Heðin Mortensen.

**Hvar er arbeiðsbólkurin**

Á vári í fjør setti samgongan við umboðum úr øllum flokkum at viðgerða útlendingaøkið yvirhøvur. Heðin Mortensen sigur, at hann longu í mái mánað í fjør spurdi, um hesin bólkur var farin í gongd við sítt arbeiði, men hann hevur einki frætt hesum viðvíkjandi.

- Eg spyrji bara, hvar er nevndin, sum skuldi gera eina loysn á hesum trupulleikunum. Vit síggja ferð aftaná ferð, at nevndir verða settar, uttan at tað kemur nakað úrslit burtur úr hesum. Vit noyðast at fáa skipaði viðurskifti á økinum, tí tað er ikki virðiligt, soleiðis sum vit fara við útlendsku ítróttarfólkunum, sigur Heðin Mortensen.

Forsetin í Ítróttarsambandinum vísir á, at slík viðferð av útlendskum ítróttarfólki bara skaðir umdømi hjá Føroyum uttanlanda, og tað fer at gerast alsamt truplari at fáa útlendsk ítróttarfólk at koma til Føroya.

- Hetta eru fólk, sum geva føroyskum ítrótti nógv og eru við til at menna ítróttina her heima. Tey eru her í styttri tíðarskeið, og so fara vit soleiðis við teimum. Um tað veruliga er so, soleiðis sum tað var lagt fram í sjónvarpinum í gjárkvøldið, so er tað ótrúliga langt úti. Eg má siga sum er, at hevði eg verið í teirra skóm, so hevði eg langt síðani farið til løgtingsins umboðsmann við málinum, tí tað ber jú eisini til at kæra landsstýrismannin, sigur Heðin Mortensen.

Eisini heldur Heðin Mortensen, at slík mál ganga út yvir øll tey, sum dagliga leggja nógva orku í tey einstøku ítróttarfeløgini, og at tað serliga eru feløgini í útjaðaranum, sum verða rakt av hesum.

- Tey hava ikki sama fólkagrundarlag sum feløgini í miðstaðarøkinum, og tí eru útlendsku leikararnir av stórum týdningi fyri teirra felag, sum til dømis Rajko Petrovic er tað fyri SÍ. Hjá okkum, sum varða av ítróttinum, er tað sera frustrerandi, og vit noyðast at fáa eina loysn á hesum sum skjótast, sigur ÍSF-forsetin.

